# Uppruddingin í fiskidagaskipanini er byrjað

**Á landsstýrisfundi týsdagin var millum annað mál um broytingar í lógini um vinnuliga fiskiskap til viðgerðar. Ætlanin er at steðga flyting av døgum millum skipabólkar, sigur landsstýrimaðurin við fiskivinnumálum**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*



*Millum málini, sum landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum hevur lagt fyri landsstýrið, eru broytingar í reglunum um landingar uttanlands, har hann vil hava, at eisini tey skip, sum ikki eru umfatað av fiskidagaskipanini, koma undir somu reglur sum tey, ið eru í skipanini*
*Mynd: Edvard Joensen*

Broytingar í lógini um vinnuligan fiksiskap eru komnar á landsstýrisborð og verða bornar niðan í Løgtingið í hesi setuni, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður við fiskivinnumálum. Nú skal ruddast upp í fiskidagaskipanini.

Millum málini, sum Bjørn Kalsø, landsstýrismaður legði fyri landsstýrisfundin týsdagin, vóru broytingar í samband við avhending og smanlegging av fiskidøgum.

Her var serligt atlit tikið til bólkarnar trý og fýra, sum eru línuskip yvir 110 tons og útróðrarbátar millum 15 og 110 tons.

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, ásannar, at tað gongur í so skjótt við at flyta útróðrardagar yvir á línuskipini. Hann heldur tað ikki vera serliga heppið, um tað endar við, at útróðrarflotin minkar munandi, ella í ringasta lagi hvørvur.

Upprunaliga ætlanin við bólkabýtinum var ongantíð, at pengar skuldu gera av, hvørjir bólkar skuldu yvirliva, og hvørjir ikki, sigur hann. Og hann er ikki áhugaður i, at tað skal enda sum eitt nú í Íslandi, har alt størri partur av útróðrarflotanum verður burtur, og stóru reiðaríini yvirtaka øll loyvini.

Bjørn Kalsø sigur, at semja var á landsstýrisfundinum um, at málið eigur at verða lagt fyri løgtingið, so tað kann avgreiðast í hesi tingsetuni. Hann sigur, at hann serliga vil hava steðgað umsetiligheitini, meðan arbeitt verður við eini veruligari uppruddingi í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Aðrir partar av lógini um vinnuligan fiskiskap vóru eisini í uppskotinum hjá landsstýrismanninum. Eitt nú um landingar uttanlands.

Sum er kunnu skip, sum ikki koma undir fiskidagaskipanina, landa har, tey hava hug. Men skipini undir fiksidagaskipanini hava álagdar bindingar, sum gera, at tey bara kunnu landa part av síni veiðu uttanlands.

Hetta vil landsstýrismaðurin nú broyta soleiðis, at øll koma undir somu treytir viðvíkjandi landingum uttanlands.

Eisini hevur landsstýrismaðurin við í sínum pakka hesaferð onkra kunngerð um gýtingarfriðingar á Bankanum, sigur hann.

Bjørn Kalsø ætlar at fáa hesi málini avgreidd sum skjótast, sigur hann. Freistin at leggja mál fyri Løgtingið er nú í mars, og síðan skal viðgerð til. Hann roknar tó við, at hesi málini verða avgreidd, áðrenn Løgtingið fer í summarfrí einaferð umleið 1. mei ella so.

# Líka ringt við Íslandskvotunum

**Eitt innslag í Degi og Viku hevur fingið tingfólk at seta landsstýrismanninum við fiskivinnumálum spurningar um rækjuloyvi. Men hatta er einki nýtt mál, siga keldur í fiskivinnuni. Soleiðis hevur verið arbeitt við íslandskvotum í áravís**

KVOTASØLUR
*Edvard Joensen*



*Í áravís hava snelluskipini fingið kvotu fyri einki frá íslendingum. Tey allarflestu hava seinnu árini selt hana aftur til onnur føroysk skip heldur enn at fara til Íslands eftir henni. Stórur partur av snelludøgunum eru endaðir hjá línuskipunum*
*(Tilvildarlig mynd)*

Røring kom í, eftir at Dagur og Vika segði frá, hvussu rækjuloyvi verða handlað millum skipini. Men soleiðis hava føroyskar snellukvotur undir Íslandi verið handlaðar í áravís, vísa fólk í fiskivinnuni á.

Føroyingar hava í eitt mannaminni fingið forerandi eitt ávíst tonsatal av botnfiski frá íslendingum. Serliga hava tað verið snelluskipini, sum eru sloppin at fiska hesa kvotuna. Upsa fyri tað mesta tey mongu seinnu árini.

Hetta eru einastu stertar, føroyingar hava fingið fyri púra einki nakrastaðni frá. Alla aðrastaðni verður goldið fyri veiðirættindi, siga fiskivinnufólk, sum Sosialurin hevur tosað við.

Føroyskir myndugleikar hava so trúliga býtt hesar upsastertarnar út til teirra, sum einaferð gjørdu sær tann ómak at fara til Íslands eftir hesum um summarið.

Men tað var skjótt, at summir funnu útav, at hetta loysti seg ikki, og fóru at selja sín part til teirra, sum tímdu at fara eftir honum.

Dømi er um, siga keldur okkara, at bátar, sum ongantíð hava havt húk umborð yvirhøvur, men bara hava trolað undir Føroyum, eisini hava fingið hesa snellukvotu undir Íslandi, og so selt hana. Í samfull tíggju ár bar hetta til. Tá skuldi hon so, eftir sum reglurnar vóru broyttar, avhendast endaliga. Og tað varð so gjørt við at selja dagarnar til eitt línuskip. Sostatt fall tann parturin av snellukvotuni burtur.

Nú løgtingslimir eru farnir at vísa áhuga fyri rækjukvotunum, átti hetta eisini at verðið tikið við, halda fiskivinnufólk.